## Mistu løn

Herfyri fóru arbeiðsfólk á teimum norsku laksavirkjunum í Kili í verkfall við kravi um betri arbeiðsumstøður og meiri løn, men í gjár gjørdu tey av at gevast við tiltakinum, eftir at leiðslan hevði lovað at tingast við tey. Men sambært norskum fjølmiðlum fingu arbeiðsfólkini ikki nógv burturúr. Arbeiðstíðin er stytt og broytt, og tað hevur við sær, at fólk fáa minni løn nú, enn tey fingu undan arbeiðssteðginum. Sáttmálasamráðingar verða aftur í juni.

## Gull í Grønlandi

Seinastu tíðina hevur felagið NunaMinerals A/S leitað eftir gulli í Grønlandi, og felagið hevur nú gjørt av at seta ferð á leitingina í Paamiut. Stjórin, Ole Christensen, sigur við Ritzau, at tey eru væl nøgd við tað, sum higartil er komið burturúr, men at ætlanin er at víðka leitingina í ár, og at nú verður leitað eftir einum egnaðum staði at bora í. Vánirnar fyri at finna gull tykjast vera bestar við Akulianq-nesið í Kvanefjørðinum, skrivar Ritzau.




# Trailari blástur av vegnum

**Stutt fyri klokkan níggju í morgun var ein trailari blástur av vegnum við brúnna um Streymin**

FERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Við Streymin:** Trailarin var á veg suðureftir. Hann var júst komin tvørtur um brúnna, tá ein hvirla brádliga tók stóra bilin og koppaði hann niðan av vegnum.

Førarin var einsamallur í bilinum, og hevði ikki fingið nakran sjónligan skaða. Kortini fór hann við sjúkrabilinum á landssjúkrahúsið til nærri kanningar.

Nógvur vindur var í Sundalagnum í fríggjamorgunin, og av og á vóru hvirlurnar harðar. Og tað var ein av hesum harðu hvirlum, sum tók í stóra trailaran og blásti hann av vegnum.

Stóri bilurin kom at liggja soleiðis, at hann lá hálvur út av vegnum, og hálvur tvørtur fyri vegin norður til Víkar.



*Klokkan beint fyri níggju í morgun tók ein hvirla ein trailara av vegnum við brúnna um Streymin*






# Tvær Ung í Føroyum stevnur í vár



**Nú kunnu føroyskir ungdómar millum 13 og 18 ár aftur at tekna seg til Ung í Føroyum. Í ár verða tvær listastevnur, onnur í Runavík og hin í Vági. Fimm kend listafólk skipa verksmiðjurnar, sum fevna um dans, tónleik, sjónleik og myndlist**

UNG Í FØROYUM
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Øll millum 13 og 18 ár kunnu nú tekna seg til tær báðar listastevnurnar, sum verða í vár. Heitið á stevnunum er: Ung í Føroyum Eystur, sum verður í Runavík 23. og 24. mars, og hin, Ung í Føroyum Suður, sum verður í Vági 30. mars til 1. apríl. Sambært Hedvig Westerlund-Kapnas, sum skipar stevnurnar, fara fimm kend listafólk at standa fyri verksmiðjunum: dansur, tónleikur, sjónleikur og myndlist.

### Fimm verksmiðjur

Dansurin verður við Jamie Boylan, ið dansaði í føroysku operuni "Í Óðamansgarði".

Dánjal á Neystabø kemur at hava tónleikin undir hendi. Hann er útbúgvin klaverleikari, og vit kenna hann frá bólkunum Tangz og Ævintýraferðini. Kristina Hansen, ið er ein av okkara fremstu yrkissjónleikarum, stendur fyri sjónleikinum.

Á Ung í Føroyum Suður verður Aggi Ásgeirsdóttir verksmiðjuleiðari innan myndlist. Aggi er ein spennandi eksperimenterandi listakvinna við útbúgving frá Det Fynske Kunstakademi. Á Ung í Føroyum Eystur hevur Oggi Lamhauge myndlist. Oggi er ein av okkara kendu grafikarum, hevur egið verkstað og gallerí í Søldarfirði, har hann eisini undirvísir.

### Sýna fram

Á stevnuni verður høvi hjá teimum ungu at sýna fram egin listaverk, antin á palli ella á framsýning, umframt at taka lut á listaverksmiðjunum.

Báðar stevnurnar enda við opnum verksmiðjum, har áhugaði kunnu koma og eygleiða, hvussu arbeitt hevur verið.

Á Ung í Føroyum Suður verður skipað fyri gisting tvær nætur, meðan Ung í Føroyum Eystur er uttan gisting. Tað eru kommunurnar í Vági, Runavík, Hovi, Porkeri og Tvøroyri, sum skipa fyri saman við Norðurlandahúsið. Tekning fer fram á heimasíðuni www.ungiforoyum.info innan 9. mars.